# Minningarorð um
# Bjørn Harlou landsdjóralækna

Fríggjamorgunin bórust boðini um, at Bjørn Harlou, landsdjóralækni var farin, eftir drúgva sjúkralegu.

Bjørn Harlou byrjaði sum landsdjóralækni í Føroyum seint í 1995.

Í sínum arbeiði hevur hann serliga lagt seg eftir at fáa veterinera lógargrundarlagið í samsvar við tað, ið verður væntað av einum framkomnum samfelag. M.a. kann nevnast løgtingslóg um djóralæknavirksemi og løgtingslóg um djórasjúkur.

Á altjóða økinum hevði Bjørn Harlou ein avgerðandi leiklut í víðkanini av handilsavtaluni við ES, soleiðis at Føroyar á matvøruøkinum, frá at verða eitt 3. land í mun til ES, bleiv eitt samhandilsland. Hendan avtalan við ES hevur ómetaliga stóran samfelagsligan týdning fyri Føroyar, og avleiðingin av avtaluni er sjónlig í føroyska gerandisdegnum. M. a. at føroyskar fiskavørar hava frítt at fara inn til ES uttan nakað sum helst mark, og at matvørur úr 3. londum tí



skulu umvegis marknaðeftirlitsstøð (BIP) í Føroyum.

Í mun til alivinnuna tryggjaði Bjørn Harlou Føroyum neyðugu loyvini frá ES til at kunna vaksinera føroyskan laks ímóti ILA virusinum. Hetta avrikið í sær sjálvum sigur meira enn nakað annað um fakliga førningin og arbeiðsevnini hjá Bjørn Harlou. Á aliøkinum stendur hendan avtalan við ES tó ikki einsamøll. Eisini hevur hann lagt framúr góðar veterinerar karmar um alivinnuna, har fakligu argumentini til eina og hvørja tíð stóðu í fremstu røð.

Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur ómetaliga nógv at takka Bjørn Harlou fyri. Hann hevur verið okkum ein hollur stuðul við sínum gløgga vinkli og skarpa viti. Fakliga støðið var altíð rótfest í altjóða viðurskiftum og hollari fakligari vitan og royndum. Og arbeiðssamur var hann sum fáur.

Saknur hevur verið í Bjørn Harlou í eina tíð, og nú hann er farin, kunnu vit haðani senda eina stóra takk til tey avvarðandi fyri alt tað, ið Bjørn Harlou hevur gjørt fyri Føroyar.

**Heilsufrøðiliga Starvsstovan**

# Minningarorð um vermóður mína
# Gunhild Joensen

Vermøður hava eitt óheppi orð á sær, men tað er kanska mest í skemtisøgum. Fyri meg hevur mín vermóður altíð verið mær góð. Hon var ikki sum aðrar vermøður, hon var nakað fyri seg.

Hon kundi vitja okkum í vikur, men ongantíð fall skeivt orð millum okkum. Altíð tók hon hond í, og vaskimaskinan var neyvan liðug at vaska, so var hon á veg út á snór við klæðunum. Hon hoyrdi bara til í húsi okkara í Esbjerg.

Dreingjunum dámdu eisini so væl, tá omma kom at vitja, tí so var altíð ein góður køkubiti at fáa. Heldur ikki nýttist mær at hugsa um at fara út ørindi, so var hon bara heima hjá dreingjunum.

Sjálvt um Gunhild sjálv átti tveir synir og heilar seks gentur, kendi eg meg altíð javnbjóðis teimum, tók meg til sín sum hennara egna.

Eg kenni meg hepna at hava átt verðins bestu vermóður, og vil við hesum fáu orðum lýsa frið yvir minnið um Gunhild Joensen.

**Lissy Joensen**

# Jóannes Skaale 70

Í dag, 22 november, verður Jóannes Skaale sjeyti ár. Jóannes er sonur fyrrverandi borgarstjóran í Havn, Sigfried Skaale og bóndadóttrina av Trøllanesi, Jóhannu Matheu Skaale, fødd Joensen.

Jóannes var føddur í Havn, men fór til Mikladals at vera, tá hann var hálvtfjórða ára gamal. Krígið herjaði, og trongligt var í húsunum í Kaldbak, har tey tá búðu. Tá Jóhanna Mathea gjørdist við barn fyri aðru ferð, var Jóannes sendur norð til mostur sína Jónu, nevnd Jónna, og mann hennara Marius Johannesen, sum var ættaður úr Funningi, og sum tá var lærari í Kallsoynni.

Jóannes vaks upp sum einasta barn hjá Jónnu og Mariusi, og roknar seg helst meiri sum mikladalsmann enn sum havnarmann.

Hann varð verandi í Mikladali inntil hann –sum flestu dreingir haðani norðan- blaðungur fór til Klaksvíkar at rógva út.

Tá hann var 15 ára gamal kom hann aftur til Havnar at ganga á VBV. Men hugurin til sjógvin var stórur, og eftir lokið preliminerprógv, var Jóannes til skips við ymsum skipum.

Í 1960 fór hann á læraraskúla, har hann hitti Óluvu Absalonsen úr Vági, sum hann giftist við í 1964. Tey giftust inn til Marius og Jónnu, sum tá vóru á háskúlanum í Havn. Og í 1965, tá Óluva og Jóannes bygdu hús í Grønulíð, fluttu Marius og Jónna við, og búðu restina av teirra lívið í kjallaraíbúðini har.

Jóannes fór, eftir lokna læraraútbúgving í 1964, beinleiðis niðan í Hoydalar at starvast. Har var hann inntil skipanin var broytt, og realdeildin var niðurløgd. Tá fór hann upp á skúla á sjómansskúlanum í Havn. Ætlanin var at fara til sjós, tí havi dró. Men mongum brestir ætlan, og tá útbúgvingin var liðug, var Jóannes biðin at vera verandi á sjómansskúlanum og undirvísa. Stórur tørvur var á monnum, ið bæði høvdu nautiska- og læraraútbúgving. Hann játtaði



við teirri treyt, at hann kundi fáa orlov av og á og fara til sjós. Fleiri ferðir gjørdi hann sær dælt av hesum, og var burtur í eitt ár hvørjaferð.

Jóannes var verandi á Sjómansskúlanum inntil 1998, tá heilsan fór at bila.

Men hóast hann ikki orkaði at undirvísa longur, hevur hann tó trúliga røkt sítt deknastarv við Havnar Kirkju í 14 ár. Harumframt hevur hann verið virkin sum skrivari í ymsum feløgum og nevndum, m.a. í Útróðrarfelagnum.

Hann kanska serliga alment kendur í Føroyum fyri at hava týtt og lisið bøkurnar "Nám Sálomon Kongs" og "Hornblower" í útvarpinum. Føroyska málið hevur hansara stóra áhuga, og á sinni hevði hann ein málteig í sjónvarpinum, umframt at hann fleiri ferðir hevur luttikið við pallborðsfundum um mál.

Størsti áhugi hansara er tó glasfipurbáturin Espingur, sum næstan má roknast sum ein partur av Jóannesi sjálvum. Nógvir tímar eru nýttir í bátinum og í egningarskúrinum -bæði til útróður og til stuttleikatúrar við børnum og abbabørnum.

Jóannes og Óluva eiga fýra børn. Magni føddur í 1965, Sjúrður føddur í 1967, Guttormur føddur í 1970 og Eydna fødd í 1981. Abbabørnini eru átta í tali, umframt at eitt er á veg.

Vit ynskja Jóannesi hjartaliga tillukku við degnum.

---

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæri pápi mín

**Petur Petersen**
fyrrverandi prestur
Tórshavn

andaðist mikudagin 21. novembur, 83 ára gamal.
Bønarhald verður í kapellinum fríggjadagin kl. 17.00.
Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni leygardagin kl. 13.

*Fyri tey avvarandi*
**Kári**

---

# Tøkk



Øllum tykkum, sum mintust meg á 80 ára degnum 29.september, og sum gjørdu mær dagin so hugnaligan og minnisríkan, takki eg hjartaliga. Takk fyri fjarrit, uppringingar, gávur og blómur. Ein serlig tøkk til børnini, svigar-, barna- og langommubørn. Takk fyri alt og Harrin signi tykkum øll.

**Dinna**

---

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum sýndu samkenslu og vóru um okkum, tá kæri maður pápi, verpápi og abbi okkara

**Martin Jakobsen**
Tórshavn

andaðist og varð jarðaður.
Tøkk til starvsfólk á Landssjúkrahúsinum, sum hjálptu okkum og veittu linna.
Tøkk til Sonju Klein fyri tína umsorgan og troystargóðu orð.
Tøkk til lærararnar í Eysturskúlanum fyri sangin og stóru hjálp tykkara til ervið.
Tøkk til næmingar og foreldur í 4. flokki fyri blómur og myndir.
Vit takka øllum tykkum, sum sendu blómur og kransar og tykkum, sum fylgdu honum.

**Katrin, Høgni, Tóra, Edith og Jóan Pauli**

---

**Dagurin**

**23. november. Klæmintsmessa.** Vit vita, at hesin Clemens (deyður umleið ár 107) livdi í Róm, tá ápostulin Pætur var á døgum, og gjørdist triði maður í stóli hansara.